# Blandað bomm frá Take Off

## Junior ljóðblandar

FUT hevur sent boð eftir einum útlendskum tøkningi at standa fyri ljóðinum á ólavsøkukonsertini.

Talan er um sama mannin, sum ljóðblandaði konsertina í fjør, og hann er eitt kent navn í donsku tónleikavinnuni.

Teir kalla hann Junior, men fulla navnið er Flemming Hansson. Hann hevur fingist við hópin av kendum nøvnum, bæði í studio og á konsertum.

Hann hevur millum annað ljóðblandað kend nøvn sum Kim Larsen, Sebastian, Will Smith, Ace of Base og Cliff Richard.

Umframt Junior eru góðir føroyskir tøkningar sum Jóhannes Steingrund og aðrir eisini uppi í leikinum, tá ið ljóðið á konsertini skal tryggjast.



*Take Off frá vinstru: Ólavur Olsen, Charlie Simonsen, Morten Vestergaard, Jønne og Hans Petur í Brekkunum*

**Take Off er helst mest virkni føroyski tónleikabólkurin í føroyska summarlandslagnum. Teir skulu spæla til nógv ymisk tiltøk, og sunnudagin standa teir fyri fyrstu ferð á pallinum á ólavsøkukonsertini**

TAKE OFF
*Eyðun Klakstein*

Tað verður svingandi føroyskur popptónleikur á skránni, tá ið Take Off fer at spæla á ólavsøkukonsertini.

Bólkurin, sum er mannaður við føroysku og donskum tónleikarum, heldur vanliga til í Århus, men hendan mánaðin munnu teir verða mest virkni føroyski tónleikabólkurin í landinum.

– Telja vit allar framførslur við, so skulu vit spæla 17 ferðir í 25 dagar, so tað er full ferð á hjá okkum, sigur Hans Petur í Brekkunum, sangari og tónasmiður í bólkinum.

Hans Petur er kendur sum dugnaligur saxofonspælari og gav fyri meira enn einum ári síðan út eina jazzfløgu, men hann hevur øll árini eisini fingist við at spæla popp- og rocktónleik.

### Tónleikararnir

Saman við honum spæla tveir føroyskir tónleikarar – Charlie og Ólavur – við í bólkinum, og harafturat koma so teir donsku tónleikararnir, Jønne og Morten. Á ólavsøku fara teir eisini at hava blásaran Mortan Zachariasen við og trummuspælaran Trygva í Brekkunum, sum fer at spæla ymisk slagverk.

Hetta eru alt dugnaligir tónleikarar, og allir teirra hava gingið á einumhvørjum tónleikaskúla uttanlands.

### Blandað bomm

Um mánaðarskiftið kom Take Off við síni fyrstu fløgu, sum teir kallaðu Blandað Bomm Fyri Rest.

Fløgan varð tikin upp í studio í Århus, men hon er á føroyskum og er ætlað føroyskum lurtarum.

Sosialurin hevur umrøðu av fløguni, tá ið hon kom út, og har skrivaði blaðið millum annað soleiðis:

– Men her er tað óbindandi poppur, njót og syng við! Ikki hugsa ov nógv, ikki seta teg í djúpa stólin við kaffikoppi og lesibrillum. Her er tað søta lívið, ið smakkar. Lívsgleðin, rútmurnar, funk- ella discokent, so fingrar og tær liva við, áðrenn restin dansar við fyri rest.

### Egið og cover

Take Off hevur mannað seg upp við tveimum gestatónleikarum til framførsluna á ólavsøku, og teir verða einasti bólkurin, sum fer at hava ein veruligan blásarapart í teirra tónleiki.

Teir fara at spæla sangir, sum eru við á fløguni hjá bólkinum, og teir hava helst eini tvey coverløg á skránni eisini.

Take Off bjóðar blandað bomm, og tey sigast at smakka sera væl.

## Take Off

**Hans Petur í Brekkunum - sang og horn**
**Ólavur Olsen - ljómborð og horn**
**Charlie Simonsen - trummur**
**Jønne - gittar**
**Morten Vestergaard - bass**
**Trygvi í Brekkunum - slagverk**
**Mortan Zachariasen - horn**

Bólkurin heldur til í Århus, men hevur seinasta árið verið tvær ferðir í Føroyum og spælt. Tríggir av tónleikarunum eru føroyingar, meðan tveir danir eisini eru við.

Fyri nøkrum vikum síðani kom fløga frá bólkinum. Teir kalla hana Blandað Bomm Fyri Rest, og á hesi eru føroyskir poppsangir, har eisini blásiljóðføri verða nógv brúkt.

Manningin í bólkinum skrivar sjálv sangirnar, sum teir spæla, men teir plaga eisini at tríva í onkur svingandi coverløg – milum annað onkur discoløg frá sjeytiárunum.

## Ólavsøkukonsertin

27. juli verður árliga ólavsøkukonsertin í Kommunuskúlagarðinum í Havn. Bólkarnir, sum fara at spæla, eru: Terji og Føstufressar, Frændur, MC Hár, Take Off, roWan, Déjá Vu, Monkey Mongolia, Troels Skovgaard, Headache Blues Treo og All That Rain. Í komandi bløðunum fara vit at hava greinar um bólkarnar, sum eru við á konsertini.



# Fólk fáa Frændur

*– Tað er hvørki nakað uppfinnsamt image ella nøkur serstøk pallframførsla, sum hevur givið okkum nýggjar lurtarar. Tað er tónleikurin sjálvur, sum hevur syrgt fyri tí, sigur Rani Nolsøe*




**Frændur hava klárað at spælt seg inn í hjørtuni á ungfólki við somu sangum, sum foreldur teirra tóku til sín fyri næstan 20 árum síðani. Sangskatturin er stórur, og á ólavsøku ætla teir at spæla onkrar sangir, sum hava ikki hava verið spældir í nógv ár**

FRÆNDUR
*Eyðun Klakstein*

Tað er nakað serligt við Frændum.

Bólkurin úr Klaksvík, sum í áttatiárunum gav tríggjar plátur út, og sum í nítiárunum staðfesti sína støðu fremsti konsertbólkurin í landinum, kann framvegis verða við millum tey størstu føroysku nøvnini.

Og tað kunnu teir uttan at smæðast.

Teir eru aftur í ár eitt av høvuðsnøvnunum til ólavsøkukonsertina, og við síni paradu av hittum kunnu teir spæla sangir í ein tíma, har fólk syngja við allatíðina.

– Fólk fáa Frændur, svarar Rani Nolsøe, tá ið hann verður spurdur um, hvat fólk kunnu vænta sær frá bólkinum á ólavsøku.

### Fáa lív í sangir aftur

Frændur hava ikki givið nakað nýtt tilfar út í meira enn fimm ár, og tí verða tað teir gomlu sangirnar, sum teir fara at tríva í.

– Men vit hava nógvar sangir, sum vit ikki hava spælt live í nógv ár, og vit ætla at tríva í onkran av teimum. Tað verður ikki bara tey stóru hittini, men eisini aðrir góðir sangir hjá Frændum, sum vit fara at spæla, sigur Rani Nolsøe, sum spælir gittar í bólkinum.

Tá ið Frændur spældi á G! festivalinum farna vikuskiftið, spældu teir onkran av teimum minni spældu sangunum frá fyrstu útgávuni hjá bólkinum í 1984, og soleiðis verður helst eisini á konsertini á ólavsøku.

### Pallurin er sakin

Tað var í áttatiárunum, at Frændur løgdu grundarlagið undir bólkinum við trimum minniligum útgávum. Í nítiárunum koma meira nýtt tilfar frá bólkinum, men tað var serliga tá, at teir fóru at gera um seg á stórum konsertum kring landið.

– Sum tónleikari venur tú nógv, og tú fært nakrar førleikar, men tað er ikki fyrr enn at tú stendur á pallinum, at tú kanst kenna teg heilan sum tónleikari. Eitt er at vera í studio og spæla sangir inn, nakað heilt annað er at standa framman fyri fólki og spæla, sigur Rani Nolsøe.

– Ólavsøkukonsertin hevur verið eitt gott upplivilsi seinastu árini. Har er nógv fólk, og vit hava kent okkum sera væl á hesi konsert. FUT hevur sanniliga tøkk uppiborið fyri hetta tiltak.

### Nýggjar lurtarar

Lurtaraskarin hjá Frændum er framvegis stórur, men tað eru ikki bara tey somu fólkini, sum hava lurtað eftir bólkinunum øll árini.

– Vit hava upplivað tað, at okkara áhoyrarafjøld er endurnýggjað. Tað eru so nógv dømi um, at tað framvegis eru ungfólk, sum lurta eftir okkara tónleiki og kenna hann, sigur Rani Nolsøe.

– Tað er hvørki nakað uppfinnsamt image ella nøkur serstøk pallframførsla, sum hevur givið okkum nýggjar lurtarar. Tað er tónleikurin sjálvur, sum hevur syrgt fyri tí. Vit mugu bara viðurkenna, at vit hava havt eina hepna hond við at gera og innspæla sangir.

Sunnudagin standa Frændur aftur á pallinum á ólavsøku, og eingin skal vera í iva um, hvat teir fara at geva fólki.

Fólk fáa Frændur.



*Eyðun Nolsøe hevur saman við Rana Nolsøe og Steintór Rasmussen verið høvuðsmaður í Frændum øll árini*

## Frændur

**Eyðun Nolsøe - sang og gittar**
**Steintór Rasmussen - sang**
**Rani Nolsøe - sang og gittar**
**Agnar Lamhauge - bass**
**Høgni Klakstein - trummur**
**Pætur við Keldu - ljómborð**

Bólkurin hevði sína fyrstu framførslu fyri 20 árum síðani, og í 1984 kom fyrsta plátan frá bólkinum. Hendan útgáva gjørdi alt fyri eitt bólkin væl umtóktan millum føroyskan ungdóm.

Síðani gav bólkurin tríggjar plátur afturat út, og í nítiárunum kom ein tvífald savnsfløga út. Á hesi fløgu eru eisini nakrir nýggir sangir.

Eyðun, Rani og Steintór hava øll árini verið høvuðsmenn í bólkinum, og teir hava skrivað allar teir kendu sangirnar hjá bólkinum.

Frændur hava spælt allastaðni kring landið, og teir teljast framvegis millum størstu tónleikanøvnini í landinum.